Løgtingslóg

um

broyting í løgtingslóg um skatting av kapitalvinningi (Kapitalvinningsskattalógin) og løgtingslóg um stuðul til rentuútreiðslur av lánum
(Skattligar avleiðingar av negativari rentu o.a.)

§ 1

Í løgtingslóg nr. 164 frá 21. desember 2001 um skatting av kapitalvinningi, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 91 frá 7. juni 2020, verða gjørdar hesar broytingar:

1. § 1, stk. 1, nr. 7 verður orðað soleiðis:

"7) Negativar rentur."

2. Í § 10, stk. 1, 1. pkt. verður aftaná "rentuinntøkur" sett: ", herímillum negativar rentur á øðrum útlánskontum enn teimum, sum eru fevndar av løgtingslóg um stuðul til rentuútreiðslur av lánum,".

3. Í § 10, stk. 1, 2. pkt. verður aftaná "rentuinntøkan" sett: "og negativa rentan".

§ 2

Í løgtingslóg nr. 148 frá 30. desember 1996 um stuðul til rentuútreiðslur av lánum, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 154 frá 13. desember 2017, verður gjørd henda broyting:

Í § 1 verður aftaná stk. 2 sum nýtt stykki sett:
"*Stk. 3*. Rentur av lánum, sum eru nevnd í § 2, verða lækkaðar við negativari rentu á útlánskontu, fevnd av § 2."

§ 3

Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Samtykt á Løgtingi hin 23. apríl 2021 við 18-0-11 atkvøðum.

formaður

/

/

skrivari

Borið saman við samtykta løgtingslógaruppskotið og funnið beint.

Á LØGTINGI, 27. apríl 2021

stjóri

lm. nr. 95/2020